# Øvugtur familjupolitikkur

HELGI ABRAHAMSEN



“Blokkstuðulin fær alsamt minni týdning í Føroyska búskapinum”, stendur í eini blaðlýsing, sum Miðflokkurin hevði í Sosialinum tann 11. mai. Undir yvirskriftini “Tøl ið tala”, verður víst á, at blokkstuðulin var 27% av samlaðu inntøkum landskassans í 2001, 16% í 2005 og 14% á fíggjarlógini fyri 2007.

Tað sum Miðflokkurin við hesum roynir at siga, er at blokkstuðulin og ríkisfelagsskapurin hava ongan nevniverdan týdning longur. Hetta skal so brúkast sum undanførsla fyri, at flokkurin hevur lagt seg ytst út á loysingarveingin.

Men her er vert at hava í huga, at um vit taka blokkstuðulin burtur av inntøkusíðuni hjá landskassanum hetta nevnda tíðarskeiðið, so sær úrslitið hjá landskassanum soleiðis út:

| 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| -298 mió. | -438 mió. | -610 mió. | -785 mió. | -836 mió. | -493 mió. | -583 mió. |

Tilsaman hevur undirskotið hesi árini verið 4.043 mió. krónur, um vit ikki telja blokkstuðulin við.

Um vit skuldu fíggjað alt hetta undirskotið við øktum skatti, so skuldi hvør einasti føroyingur goldið 11.946 krónur meira í skatti um árið (tá eru bæði børn og pensjónistar íroknað).

Siga vit at 5 fólk eru í einum meðal føroyskum húski, so skuldi hvørt húski goldið umleið 60.000 krónur meira í skatti um árið. (5.000 krónur um mánaðin).

Ein annar møguleiki hevði verið, at skatturin ikki hækkaði so nógv, men at almenna tænastustøðið eisini lækkaði. Til dømis kundi skattarokningin hækkað við helvtini av 60.000 krónum, og so kundi ein verri tænasta klárað restina. Í øllum førum hevði talan verið um okkurt slag av “øvugtum familjupolitikki”.

So avtakið tit bara blokkstuðulin. Úrslitið verður ein nógv hægri skattur og ein munandi verri almenn tænasta. Tað stendur rimmar fast.

# Politiskir flytifuglar

EYÐUN MOHR VIDERØ



Tveir meir og minni virknir persónar í politikki hava í hesum døgum skift flokk. Báðir eita Heðin.

Heðin Mortensen varð av sambandsfólki í Havn valdur inn í býráðið, men valkvøldið breyt hann avtaluna við floksfelagar sínar í býráðnum um komandi samgongu, tí hann hevði fingið ”tilboð” frá Javnaðar- og Tjóðveldisflokkinum um at gerast býráðsformaður í høvuðstaðnum. Tað hevði ikki verið møguligt í avtaluni við Fólkaflokkin. Og hvør hevði ikki slept hugsjónini fyri eitt so gott tilboð við tilsvarandi prestigu?

Við at fylgja við í politiska arbeiðnum, so kann neyvan vera talan um, at Heðin er ”headhunt-aður” fyri síni politisku evni, men heldur eitt taktiskt spæl hjá Javnaðar- og Tjóðveldisflokkinum fyri at skipa stjórn í býráðnum. Hetta er ikki ókent í politikki.

Heðin D. Poulsen hevur verið limur í Fólkaflokkinum, men hevur nú meldað seg úr felagi floksins í suðurstreym.

Hann hevur upplýst sambært Dimmalætting, at stevnuskrá floksins er besta skráin, men av teimum valdu verður hon ikki fylgd sambært hansara hugsan. Nágreiniliga er ikki upplýst neyvt um einstøku málini, men sagt hevur verið, at serlig ynski broytingar í jarðarlógini ikki eru í uppskotium frá landsstýrinum. Fyri mær er óvist, um hetta snýr seg um betri umstøður hjá jarðarbrúkinum, ella tað snýr seg um egináhugamál.

Eg kenni ikki mannin í politiska arbeiðinum, men Dimmalætting upplýsir, at Heðin hevur verið uppstillaður til val, men hevur fingið alt ov fáar atkvøður fyri at verða valdur.

Ivaleyst hevur Heðin evni til at greiða frá politisku ætlanini sambært góðu stevnuskrá Fólkafloksins, men hví fekk hann so ikki størri undirtøku?

Mín niðurstøða er tí, at feilurin, at Heðin ikki varð valdur, liggur ikki hjá Fólkaflokkinum, men feilurin er hjá veljarunum!

So nú kann Heðin siga við veljararnar, sum maðurin segði á sinni: Ró nú Snopprikkur!

Sambært Dimmalætting ætlar Heðin ikki at gevast í politiskum arbeiði, men nevnt var ikki hvar. Blaðið nevndi um møguleikan fyri Sjálvstýrisflokkinum.

Mong misnøgd fólk eru farin úr øðrum flokkum og í Sjálvstýrisflokkin, men uttan at nakað er spurt burturúr. Mær kemur henda flokk vera eins og ein kompostkassi. Lívrunnið tilfar verður koyrt í hann, men tað so tekur langa tíð, áðrenn hetta aftur kann verða til nyttu, tí tíðin longu er farin frá hesum føðsluevnum!

Annars er at siga, at tann sum vil fram í politikki, má hava sjónligar ambitiónir, men eitt mark átti at verið fyri, hvussu illa ein vil meinsla sítt eginvirði!

# Fólksins kirkja

SÚSANNA DAM



Mangan kann tað undra hvussu máttleyst vit bera okkum at, tá støða skal takast til teir týdningarmiklastu spurningarnar í tilveruni.

Hugsi um ta viðgerð yvirtøkan av fólkakirkjuni hevur fingið og fær. Í løtuni tykist mest sannlíkt at fólksins kirkja bara skal avreiðast til hægstbjóðandi.

Í Føroyum er fólkakirkjan og hennara læra høvuðsgrundarlagið undir siðalags- og mentanartilvitanini hjá einum stórum meirluta av fólkinum, enntá so nógvum, at vit kanska hava kvalificeran meiriluta, tá til stykkis kemur

Hóast hetta sýnist sum innan løgting og millum onnur, ið taka avgerðir, eru holdningarnir sera jánkasligir, fyri ikki at siga líkasælir. Eitt skirvni, ið einki hevur við tolsemi at gera, og at halda at tolsemi loysir spurningin, so øll verða nøgd, kann tykist avbera fávitskut.

Hví ikki ásanna at evstu áhugamálini hjá fólkakirkjuni og fríkirkjunum eru beinleiðis øvugt av hvørjum øðrum.

Mær tykir nærum, at okkara politikkarar, sita á oyrunum, tá harðmæltir fríkirkjumenn royna at sannføra um sínar bíbilsku kunngerðir og religiøsa orðabrask.

Fólkakirkjan hevur havt brúk fyri hvørjum einstøkum okkara uttan treytir, og hevur tikið ímóti okkum í tí støðu, vit nú einaferð eru stødd í, uttan mun til hvat umheimurin annars skuldi ditta sær at hildið um okkara religiøsa habitus og etiska forfall. Verða hesi viðurskifti broytt í yvirtiknu kirkjuni, er helst betur at taka hana av beinanvegin, nýta peningin til okkurt annað skilabetri og lata fríkirkjurnar orðna restina.

Tala hagtølini rætt so eru 4 av hvørjum 5 føroyingum limir í fólkakirkjuni, og tað eiga politikkarar at hava fyrilit fyri, tá teir taka avgerðirnar. Á ongan hátt eigur at verða samanborið við fríkirkjurnar, tær tæna heilt einfalt ikki sama endamáli sum fólkakirkjan, og tí mugu tey, sum varða av henni, skilja og samtykkja innihaldið í hugtakinum “fólkakirkja”, so einfalt, men at vísa seg sera trupult at seta í verk.

# Musikklærarar mótmæla vánalig viðurskifti

**Fyrrapartin mótmæltu musikklærararnir uttan fyri Løgtingshúsið fyri at vísa sína misnøgd við umstøðurnar hjá lærarum, ið undirvísa á bygd**

MÓTMÆLISGONGA
*Rólant Waag Dam*
*roland@sosialurin.fo*




*Ljóðførini vóru tikin fram í morgun, tá limir í Musikklærarafelagnum mótmæltu versnandi viðurskiftunum hjá musikklærarum á bygd*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Landsins musikklærarar eru sera misnøgdir við viðferðina, teir lærarar, ið ferðast millum fleiri skúlar, hava fingið. Í meir enn 10 ár hava musikklærarar, ið undirvísa á fleiri skúlum, fingið tímapening fyri tíðina, teir eru burtur í arbeiðsørindum. Hetta er ikki ein heilt týdningarleys upphædd fyri einstaka læraran. Í meðal einar 8000 skattafríar krónur um árið.

Samlaða játtanin til hetta endamál er á leið 200.000 krónur um árið, men hendan játtan er ikki til longur.

Musikklærarafelag Føroya hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at um munandi bati ikki verður gjørdur hesum viðvíkjandi, verður gongdin tann, at musikklærarar flyta alt sítt yrki til Havnar, tá ið høvið býðst. Hetta hevur verið týðiliga gongdin seinastu fimm árini, vísir felagið á.

- Við hesum eru landsins myndugleikar við til at máa støðið undan høvuðstankanum við Musikkskúlalógini. Nevniliga, at allir føroyingar skulu fáa møguleika til tónleikafrálæru á høgum støði, sigur Musikklærarafelagið.